## VIÐMERKINGAR

# Lógarfusk í altjóðagerðini

HERGEIR NIELSEN
løgtingslimur



**Uttanlandsnevndin er samd um, at løgmaður hevur borið seg skeivt at í framløgu síni av Hoyvíkssáttmálanum**

Full semja er um, at tað er skeivt at samtykkja sáttmálan sum lóg, so sum løgmaður hevur skotið upp.

Soleiðis sum fleiri okkara lýstu málið undir fyrstu viðgerð fyri fimm mánaðum síðan, soleiðs vísir tað seg at hanga saman.

Umsiting løgtingsins og ein røð av advokatum eru samd í sjónamiðum okkara og mæla so avgjørt frá at samtykkja uppskot løgmans.

Íslendingar eru av somu hugsan sum vit, og íslendska Altingið fer eisini at samtykkja sáttmálan sum uppskot til samtyktar.

Hóast uttanlandsnevndin er samd um sjálvan leistin, og um framtíðarleistin fyri sáttmálager av hesum slag, so er hon ósamd í tilmæli sínum til løgtingið.

Vit, sum eru í minnilutanum, mæla tinginum til at samtykkja málið samsvarandi sannføring okkara.

Meirilutin er hinvegin hoknaður undir trýstinum frá løgmanni, og móti síni sannføring mælir hann løgtinginum til at samtykkja sáttmálan sum lóg.

Teir fýra javnaðar- og fólkafloksmenninir í meirilutanum skriva søgu.

Teir viðganga enntá, at teir mæla tinginum til at samtykkja lógarfusk – við víðfevndum samfelagsskaðiligum avleiðingum fyri altjóðagerðina.

Teir siga um tilmæli teirra til løgtingið:

– *"at hesin háttur ikki er framtíðar leistur og ikki á nakran hátt skal skapa fordømi fyri framtíðar sáttmálagerðum av hesum slagi."*

Sjálvt barnið í vøgguni spyr tá, hví í verðini eitt heilt løgting skal samtykkja nakað, sum ein heil nevnd er samd um, er skeivt.

Svarið er, at løgmaður hevur hótt við at taka málið aftur, verður tað ikki samtykt eftir hansara høvdið.

Hesir báðir heimastýrisflokkarnir mæla tí tinginum til at samtykkja eitt mistak hesa fyrstu ferðina, ein tílíkur sáttmáli verður gjørdur.

Teir mæla løgtinginum til at virka móti betri vitandi, og at samtykkja eitt lógarkent misfostur hjá løgmanni, sum eftir teirra høvdið kortini ikki skal vera nakað fordømi frameftir.

Vit í minnilutanum vilja ikki hava ruðulleika á økinum, og síggja ein beinleiðis vanda fyri samfelagið, um vit stíga skeivt í hesum fyrsta týdnnigarmikla stigi okkara út í altjóðagerðina.

Samstundis sum vit nú hoyra advokatarnir tosa um lógarfusk í altjóðagerðini, undrast øll nú yvir ein løgmann, sum trýstir eitt løgting frá at halda lóg og landaskil.

Tá stríðið í nevndini um mánaðarskiftið februar/mars var upp á tað hægsta gav formaður sambandsfloksins formanninum í uttanlandsnevndini sína treytaleysu tilsøgn, tá hann í Dimmalætting skrivaði:

– *"At taka formannin hjá okkum í Uttanlandsnevndini av ræði, er tað sama sum at taka Sambandsflokkin av ræði, og tað uttan haldgóðar grundgevingar, og tað verður ikki góðtikið*

*– Formaður okkara í Uttanlandsnevndini ger eitt dygdargott arbeiði, og vit stuðla honum fult í hansara arbeiði í nevndini, og tað vilja vit eisini heita á okkara samgongulimir um at gera."*

Vit í minnilutanum halda eisini, at formaðurin í nevndini hevur gjørt eitt gott arbeiði saman við okkum øðrum.

So fáa vit at síggja, um sambandsflokkurin verður tikin av ræði í fyrsta lagi, og um hann góðtekur tað í øðrum lagi.

Hoknar sambandsflokkurin eisini, so kunna vit ikki siga annað enn:

- *"Hoknaðu í taratøðum, hetjurnar á Stiklastøðum."*

# Uppskot til broytan av § 1 í føroysku skattalógini

MARTIN PAULI JACOBSEN

**Ein føroysk familja, ið flytur uttanlands at búgva í 4 ár, har skatturin er lægri enn tann føroyski, skal tibakarvirkandi skattast í føroyum av síni inntøku uttanlands, um hon flytur heim aftur til føroyar 4 ár seinni.**

**Skattalógin sigur :**

**§ 1.** Fulla skattskyldu hevur:
**1)** Hvør persónur, ið hevur bústað í Føroyum.
**2)** 1) 2) 25) Hvør persónur, sum innan 4 tey seinastu árini hevur havt bústað her í landinum, uttan so at hann prógvar, at hann er undir skyldu at gjalda inntøkuskatt uttanlands. Tað er tó ein treyt, at skattingin ikki fer fram eftir reglum, sum eru eyðsýnt lagaligari enn skattareglurnar í Føroyum.

Landsstýrismaðurin í skattamálum avger, um inntøkuskattingin uttanlands má metast sum eyðsýnt lagaligari enn eftir skattareglunum í Føroyum. Avgerðin, um skattingin uttanlands eyðsýnt kann metast sum lagaligari enn eftir skattareglunum í Føroyum, verður tikin út frá eini heildarmetan. Eisini hevur tað týdning fyri metingina, um ein verulig inntøkuskatting fer fram, um inntøkuskattingin sum meginregla fevnir um allar inntøkur, uttan mun til hvaðani tær stava, og um inntøkuskattingin fer fram eftir reglunum galdandi fyri persónar búsitandi har.

Fylgirnar av hesu paragraf eru :

**Ein føroyska familja ið flytur til eitt land har skattaprocentið er 20 %, og flytur heim aftur til føroyar 4 ár seinni, fær 30 % føroyskan tilbakarvirkandi 4 ár aftur í tíðina fyri tey árini tey vóru uttanlands.**

Henda paragraf í skattalógini hindrar føroyingum at flyta til onnur lond at búgva, har skatta prosentið er lægri enn í føroyum. Lønarlagið ið einum landi er altíð tengt til skattatrýstið í landinum. Hetta er eitt stavnsband.

**Tað er einki annað land ið bindur sínar íbúgvar frá at gerast alheimsborgarir sum Føroyar.**

Broytið tí § 1. í skattalógini soleiðis.

**§ 1.** Fulla skattskyldu hevur:
**1)** Hvør persónur, ið hevur bústað í Føroyum.
2) Kapital inntøkur frá føroyskum virkjum og rentur skattast í føroyum.
3. Føroingur ið býr uttanlands og skattast har og hevur familjuna í føroyum skattast har han býr

**Viðmerkingar.**
Ein føroyingur skattast har hann býr. Um dupultskatta avtala er gjørd millum Føroyar og viðkomandi land er dupultskatta avtalan galdandi.

**Niðurstøða:**
**Um ein ynskir at arbeið í altjóða umhvørvi skal man ikki búseta seg í Føroyum.**

**Visión 2015 er deyadømd um ikki føroyingar á landi ikki fáa somu treytir at arbeiða í altjóða umhvørvi sum onnur.**

Svar til Jørgen Evald Solmunde:

# Takk fyri áhuga um limaskap ÍSF í IOC

HEÐIN MORTENSEN



**Øll norðurlendsku ítróttasambondini og olympisku nevndirnar uttan tey í Svøríki hava stuðlað føroysku umsókníni. DIF stuðlar føroysku umsókníni frá 1984, men ásannar samstundis, at galdandi reglurnar hjá IOC bert loyva sjálvstøðugum londum limaskap.**

ÍSF hevur við atliti til 1984-umsókina valt at vera uttan fyri DIF-samstarvið, eftirsum vit ynskja sjálvstøðugan limaskap. Grønlendska Ítróttasambandið hevur onga vón um sjálvstøðugan limaskap fyribils, og hevur tí valt at luttaka á danska OL-landsliðinum, har tað ber til.

Trætumálið millum danir og grønlendingarnar snýr seg um luttøkutreytirnar, ið verða settar donskum og grønlendskum ítróttafólkum. Grønlendingar ynskja serliga lagaligar treytir fyri síni ítróttafólk, meðan danir føra fram, at uttan mun til, um ítróttafólkini koma úr Danmark, Grønlandi ella fyri so vítt úr Føroyum, skulu tey uppfylla somu krøv.

Tað er í hesum høpinum, at DIF samanber føroysk og grønlendsk ítróttafólk. Um føroyska ítróttarrørslen ger av, at vit skulu royna at fáa føroysk ítróttafólk á danska OL-landsliði, eru tey vælkomin sigur DIF. Men ÍSF hevur sagt, at føroysk ítróttarfólk einans koma at luttaka sum føroyingar og fyri Føroyar. Alt annað kemur ikki uppá tal.

Skrivið frá Rogge vísir ikki til 1984-umsóknina, men sigur bert, at við verandi IOC-lóg og verandi ríkisrættarligu støðu Føroya, kunnu Føroyar ikki upptakast sum sjálvstøðugir limir.

Støðan hjá DIF er tann sama, sum hon altíð hevur verið. Teir stuðla 1984-umsóknini, men geva føroyskum ítróttafólkum møguleikan at luttaka á danska OL-liðnum, um ÍSF ynskir tað. Men tað hevur ÍSF onki ynski um, tí vit eru føroyingar undir egnum flaggi.

Um Gibraltar vinnur rættarmálið, fáa Føroyar og Gibraltar sambært keldum í IOC sjálvstøðugan limaskap í IOC. Skrivið hjá Rogge broytir einki í so máta. Tað er bert ein staðfesting av verandi støðu.

Báðir partarnir í rættarmálinum, IOC og Gibraltar, krógva síni kort væl, og eru tí ikki áhugaðir at siga so nógv um gongdina í rættarmálinum.

ÍSF arbeiðir víðari við málinum. Í løtuni verður roynt at fáa fund í lag við IOC. Vit ætla framhaldandi at vísa á, at okkara umsókn varð send inn, áðrenn reglurnar vórðu broyttar, og at hon tí eigur at verða viðgjørd sambært teimum reglum, ið vóru í gildi, tá umsóknin varð send inn.

# Grætur Merkið flaggdagin?

MARJUS DAM
løgtingsmaður



**Mangar staðir grætur Merkið – hvønn einasta flaggdag**

Aftur í ár, skal ein stórur partur av føroyingum flaggdagin "standa model" til eina niðurgerðing.

Merkið er merkið alra føroyinga. Mangar staðir standa fólk ár eftir ár spyrjandi. Hvussu ber tað til, at tey, ið fyri ein stóran part bera fram flaggdagsrøðu eru tjóðveldisfólk ella loysingarfólk? Hava vit eina flaggdags mafiu, ið velur loysingarfólk, fyri ein stóran part, at halda røður flaggdagin?

Ikki er heldur sørt, at flaggdagurin eisini verður nýttur av somu loysingarfólkum at senda pílar eftir sambandsfólkum. Undirtónin er tann, at loysingarfólk eiga Merkið. Tað skal undra, um hendan grova manipulatión ið er farin fram flaggdagin, ikki eisini verður at hoyra fleiri staðir í ár. Tey sjálvútnevndu "reinu", fara enn einaferð at royna at stjala Merkið, við at prísa egnum dygdum, m.a við at traðka á aðrar landsmenn.

Nakrir sokallaðir "stikkpillarar" verða helst sendir sambandsfólkum aftur í ár.

Um bert ein lítil javnvág skal fáast i flaggdagshaldini, so er neyðugt, at sambandsfólk komandi 50 árini halda hvørja einastu flagsdagsrøðu her á landi.

Flaggið er Merkið hjá øllum føroyingum. Ein kann ikki finna seg í, at mítt Merkið verður stolið av loysingarfólkum.

Antin SKAL skeiva siðvenjan broytast – ella mugu vit Sambandsfólk skipa fyri Flaggdagshaldi – fyri allar føroyingar.

Eg hvørki tími ella vil longur finna meg í loysingarsvassi sjálvan flaggdagin.

Vit mugu koma á eitt hægri støði. Tað hava nevniliga bæði føroyingar og Merkið uppiborið.

MERKIÐ MÁ IKKI GRÁTA LONGUR.